Barnaverndarstova Føroya

mariam@bumr.fo
Barna- og útbúgvingarmálaráðið
Att. Maria Michelsen, fulltrú
J.H. Schrøtersgøta 7
100 Tórshavn

Dagfesting
30. januar 2024

Okkara j.nr.
14/02253-23

Málsviðgeri
Anna Dam

Tygara j.nr.

Hoyringarsvar viðvíkjandi løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barnavernd

(Ásetingar um at boða frá, fyribyrgjandi fyriskipanir, stuðul til foreldramyndugleikan, avgerðir um ávís viðurskifti hjá barninum og um at flyta eitt barnaverndarmál.)

Barnaverndarstova Føroya hevur viðgjørt uppskotið til broytingar í løgtingslóg um barnavernd og fegnast um, at hugt verður at barnaverndarlógini og vónar, at arbeiðið ikki steðgar her, tí vit og barnaverndartænasturnar í longri tíð hava gjørt vart við, at tørvur er á at eftirmeta lógina.

Viðmerkingar:

1. Í § 14 verður sum stk. 7 sett:
''Stk. 7. Fáa persónar í sambandi við almenna starv sítt, og persónar, sum útinna virksemi innan barna- og ungdómsøkið fyri tað almenna, kunnleika til viðurskifti ella hava orsøk til at halda, at eitt barn undir 18 ár, sum hevur bústað í Danmark, kann hava tørv á serligum stuðli ella hevur verið fyri ágangi, kunnu tey boða viðkomandi myndugleika í Danmark frá hesum. Ásetingin fevnir eisini um ófødda barnið, sum vegna viðurskifti hjá foreldrunum, kann fáa tørv á serligum stuðli eftir føðing''.

Tað tykist nakað ógreitt, hvat henda áseting fevnir um, og tað verður viðmerkt, at talan er ikki um eina fráboðanarskyldu. Vit duga ikki at síggja orsøkina til at avmarkað hetta til Danmark. Hetta kann eisini verða viðkomandi í mun til onnur lond enn Danmark.

***2.** Í § 15, stk. 1 verður aftan á nr. 11 sum nýtt nr. 12 sett:*
''12) veita aðra hjálp til barnið og/ella familjuna so sum ráðgeving, viðgerð, praktiskan og námsfrøðiligan stuðul ella líknandi.''

Barnaverndartænasturnar hava tulkað ásetingina í § 15 um fyribyrgjandi fyriskipanir vítt, soleiðis sum ásett er í viðmerkingunum til upprunaliga lógaruppskotið um barnaverndarlóg.

Barnaverndarstova Føroya

Løgtingsmál 10/2004 (síða 48)

> "Dentur er lagdur á at orða fyriskipanirnar í stykki 1 soleiðis, at tær kunnu tulkast vítt. Hetta er gjørt fyri ikki at forða barnaverndarnevndini í at veita hjálp, tá ið tað verður mett at vera neyðugt fyri familjuna ella barnið. Í stykki 1 er ein uppreksan av teimum fyriskipanum, sum barnaverndarnevndin kann veita, tá ið omanfyrinevndu krøv eru lokin. Tær einstøku fyriskipanirnar í greinini hava hvør sítt endamál, men eru samstundis so smidligar, at tær í summum førum umskarast. Ætlanin við at útgreina fyriskipanirnar í greinini er at gera tær meira sjónligar fyri barnaverndarnevnd, foreldrum og børnum. Fyriskipanirnar kunnu veitast hvør sær ella saman; raðfylgjan av fyriskipanunum er ikki ætlað sum ein raðfesting av gongdini í málsviðgerðini."

Mett verður, at tørvur er á at nágreina hesa nýggju áseting neyvari. Er hugsanin, at henda heimild eisini kann nýtast at veita fíggjarligan styrk ella eitt nú ókeypis advokathjálp? Og um so er, hvør skal tá rinda fyri slíkar fyriskipanir? Í dag kann Føroya Kærustovnur avgera at veita ókeypis umboðan í málum, har samtykki ikki verður givið til umsorganaryvirtøku ella samveru. Til tíðir kann tørvur verða á, at foreldur og børn fáa tilboð um ókeypis umboðan av advokati, langt áðrenn nakað tilmæli er gjørt um umsorganaryvirtøku. Slík skipan er galdandi í okkara grannalondum, og støða eigur at verða tikin til, um til ber at játta slíka fyriskipan her eisini, og um so er, hvør skal gjalda fyri slíka umboðan.

Tað gevur ikki nógva meining at áseta, at ein fyriskipan, so um ráðgeving ella hjálp til foreldur, kann setast í verk uttan samtykki, men tað kann vera av týdningi at fáa greiða heimild í mun til børnini. Eisini mæla barnaverndartænasturnar til, at tað verður greitt ásett, at tá talan er um felags foreldramyndugleika, kann hjálp og ráðgeving veitast øðrum foreldrinum og barninum, so sum familjuráðgeving ella terapi, hóast hitt foreldrið ikki samtykkir.

Mett verður, at verandi skipan í stóran mun longu loyvir barnaverndartænastunum at veita "aðra hjálp til barnið/og familjuna", men tørvur er á at fáa gjørt kunngerðir og vegleiðingar sum heild til barnaverndarlógina, sum er at meta sum eina rammulóg, sum ikki er serliga ítøkilig. Her er tað av týdningi, at galdandi siðvenjur, sum eru mentar av eitt nú barnaverndartænastunum og Høvuðsbarnaverndarnevndini, verða feldar niður í vegleiðingar frá avvarðandi málaráði.

3. Í § 15, stk. 2 verður ''stk. 1, nr. 1, 4, 5, 6, 9 og 10'' broytt til: ''stk. 1, nr. 1, 4, 5, 6, 9, 10 og 12''.
Onga viðmerking

4. Í § 19 verður sum stk. 5 sett:

''Stk. 5. Barnaverndarnevndin kann, við samtykki frá og í samstarvi við tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan, seta fyriskipanir sambært § 15 í verk fyri foreldramyndugleikan, ímeðan barnið er sett heiman. Fyriskipanirnar skula viðvirka til at loysa teir trupulleikar, sum hava verið orsøk til at barnið varð sett heiman, og hjálpa foreldrunum í at hava umsorgan fyri barninum í sambandi við eina møguliga heimsetan ella í sambandi við samveru við barnið, ímeðan tað er sett heiman.''

Eitt aðalmál í barnaverndarlógini er at arbeiða fyri, at børn, sum eru sett heiman, kunnu koma heim aftur til foreldrini at búgva. Barnaverndartænasturnar hava, síðani galdandi lóg kom í gildi 1. januar 2006, nýtt § 15 sum heimild at seta í verk stuðlandi tiltøk og fyriskipanir fyri foreldur, hvørs børn eru

Barnaverndarstova Føroya

sett heiman við ella uttan samtykki. Barnaverndartænasturnar hava ikki mett seg avmarkaðar í at geva hjálp eftir § 15 við tað, at uppreksanin bert er at meta sum vegleiðandi, sí omanfyri. Tað, sum hevur verið avbjóðandi, eru teir markamótstrupulleikar, sum eru við økið, sum Almannaverkið varar av, eitt nú tá talan er um børn, sum bera brek og hava diagnosur, sum verða mettar at vera høvuðsorsøkin til trupulleikarnar í einari familju. Eisini hevur tað víst seg, at í summum førum er tað fátækradømi, sum er høvuðsorsøkin til, at familjur og børn hava tað trupult, og barnaverndartænasturnar hava ikki heimild til at veita fíggjarliga hjálp, og tað tykist eisini at vera trupult at fáa nøktandi hjálp frá AV í summum førum. Mett verður, at hesin trupulleiki eigur at verða viðgjørdur millum land og kommunur.

So leingi børnini eru fyribils umsorganaryvirtikin, hevur barnaverndartænastan skyldu til og heimild í verandi lóggávu at arbeiða fyribyrgjandi, og at arbeiða fyri at barnið kann verða sett heim aftur. Henda broyting kann gera hetta týðiligt, og tí taka vit undir við. Tørvur er eisini á áseting, sum sigur, at í summum førum gevur tað ikki meining at arbeiða fram ímóti heimsetan, eitt nú tá foreldur hava gjørt seg inn á børn.

5. Í § 21 verður sum stk. 3 sett:
''Stk. 3. Tá tað verður mett neyðugt fyri endamálið við heimansetanini, kann barnaverndarnevndin, grundað á eina leypandi uppfylgjan og eftirlit við barninum sambært § 16, taka avgerð um at broyta uppihaldsstað, viðgerð og útbúgving v.m., ímeðan barnið er sett heiman.''

Barnaverndartænasturnar hava mett seg hava heimild til at taka neyðug stig at tryggja heilsu og vælferð hjá børnum, ið eru umsorganaryvirtikin, eitt nú við at fáa tey til neyðugar læknakanningar, viðgerðir og útgreiðingar eitt nú á Psykiatriska deplinum. Eisini hava barnaverndartænasturnar mett, at heilsufaklig tilmæli, um eitt nú barnakoppsetingar, eiga at verða fylgd fyri børn, sum eru umsorganaryvirtikin, eisini hóast foreldrini ikki geva samtykki til hetta. Um so er, at Barna- og undirvísingarmálaráðið metir, at tað er neyðugt at nágreina slíka heimild í lógini, so hava barnaverndartænasturnar einki ímóti tí, men meta tað umráðandi at slík heimild er greið.

Eitt nú má støða takast til, um til ber at broyta fyriskipan, uttan at avgerð er tikin um hetta av Føroya Kærustovni, soleiðis at eitt barn, sum ikki longur rúmast í einum fosturheimi, verður flutt á viðgerðarstovn. Eisini kann verða viðkomandi at flyta barn av stovni í fosturheim.

6. § 42, stk. 2, nr. 5 verður strikað.

Onga viðmerking

7. Í § 58 verður sum stk. 4 sett:

''Stk. 4. Avtala kann gerast ímillum barnaverndarnevndir í heilt serligum førum um, at eitt barnaverndarmál verður flutt frá einari barnaverndarnevnd til eina aðra barnaverndarnevnd at umsita.''

Í ávísum førum kann verða tørvur á at flyta mál og í ávísum førum mugu barnaverndartænasturnar samstarva um mál, eitt nú tá foreldur sum hava felags foreldramyndugleika búgva í hvør sínum økið. Tørvur er á at fáa ásett reglur í mun til býti av útreiðslum og umsiting millum barnaverndartænastur tá

talan er um mál sum viðvíkja fleiri økjum og vildi tað verið viðkomandi at tikið tað við í hesum sambandi.

Eisini kunnu ávísar smærri barnaverndartænastur verða so upphongdar av arbeiðið at tær mugu keypa sær hjálp frá øðrum økjum í ávís tíðarskeið. Tað kann eisini verða viðkomandi at lata eina barnaverndartænastu umsita eitt mál fyri aðra barnaverndartænastu fyri at sleppa undan ov nógvum skiftum sum hvørki eru gagnlig fyri børn ella foreldur.

Mælt verður til at strikað orðingina *"í heilt serligum førum"* tí mett verður, at viðkomandi barnaverndartænastur duga at meta um, nær tað er skilagott at samstarva um/og ella flyta mál.

Vinarlig heilsan

Anna Dam

Løgfrøðiligur ráðgevi

TELEFON (+298) 30 24 80 | MOBIL (+298) 519082

R. C. Effersøesgøta 26, 100 Tórshavn

annadam@bvs.fo

WWW.BVS.FO